
TOYOTA COROLLA 1,6 LINEA TERRA 5D H/B — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** LJ 887 **Km:** 99.500
**Árgangur:** 27.03.02 **Seinast sýnaður:** 22.06.06
**Kr. 115.000,-**


TOYOTA CAMRY 3.0 GL SEDAN AUT — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** ER 235 **Km:** 94.000
**Árgangur:** 12.04.00 **Seinast sýnaður:** 09.11.05
**Kr. 165.000,-**


TOYOTA AYGO 1,0 PLUS 5D — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** PR 455 **Km:** 23.000
**Árgangur:** 15.03.06 **Seinast sýnaður:** 15.03.06
**Kr. 122.000,-**


TOYOTA YARIS 1,0 H/B SOL 5H
**Skrásetingarnr:** UB 560 **Km:** 61.000
**Árgangur:** 24.04.02 **Seinast sýnaður:** 30.05.06
**Kr. 82.000,-**


TOYOTA AVENSIS 2,0 TD
**Skrásetingarnr:** PD 445 **Km:** 235.000
**Árgangur:** 03.09.99 **Seinast sýnaður:** 15.01.07
**Kr. 78.000,-**


MAZDA B- 2500
**Skrásetingarnr:** RH 427 **Km:**
**Árgangur:** 28.03.00 **Seinast sýnaður:** 27.11.06
**Kr. 80.000,-**


PEUGEOT 106
**Skrásetingarnr:** TD 501 **Km:** 153.000
**Árgangur:** 06.01.98 **Seinast sýnaður:** 31.03.05
**Kr. 30.000,-**


VW PASSAT AUT — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** BP 247 **Km:** 143.000
**Árgangur:** 20.12.98 **Seinast sýnaður:** 17.02.05
**Kr. 98.000,-**


TOYOTA RAV 4 2,0 AUT PLUS — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** PB 382 **Km:** 6.300
**Árgangur:** 26.10.06 **Seinast sýnaður:** 26.10.06
**Kr. 335.000,-**


RENAULT MEGANE 1,6 — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** AU 145 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 22.04.04 **Seinast sýnaður:** 22.04.04
**Kr. 140.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Tvey ferðsluóhapp í Suðuroy

**Tvey ferðsluóhapp vóru í Suðuroy um vikuskiftið, har ein bilur rendi á ein húsavegg í Vági, meðan ein annar fór sendandi út av vegnum úti í Nes í Hvalba**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Leygarmorgunin um tveytíðina var ein ungur bilførari rættiliga heppin, at hann slapp so gott sum hann gjørdu úr einum ferðsluóhappi úti í Nes í Hvalba. Løgreglan veit ikki heilt, hví bilurin fór út av vegnum og bóltaði fleiri ferðir, men greitt er, at maðurin var ávirkaður av rúsdrekka og ein blóðroynd er tikin.

Løgreglan í Suðuroy metir, at maðurin var rættiliga heppin.

– Hevði hann rulla einaferð aftrat hevði verið heilt galið, segði løgreglan í Suðuroy í morgun. Hagani søgdu tey eisini, at í vegastrekkinum har bilurin fór útav, arbeiða tey í løtuni við at breiðka vegin.


*– Hevði hann rulla einaferð aftrat hevði verið heilt galið, sigur løgreglan*


*Bilurin fekk ikki lítið av skaða, men bilførarin slapp uttan stórvegis mein, tá hann rendi á eini hús í Vági*
*Mynd: Johs. Andreasen*

### Rendi á hús

Seinni leygardagin var eitt annað ferðsluóhapp, tá ein bilur inn í húsini í Vági, har eitt nú Granskingardepilin heldur til og gamla tryggingarstovan var.

Bilurin kom koyrandi út eftir høvuðsvegnum í bygdini. Hann fór út av vegbreytini, rendi í ein ferðslustandara og fór síðani tvørtur um vegin, har hann rendi inn í húsaveggin. Bilurin fór rættiliga illa, men álvarsligur fólkaskaði var ikki, hóast bilførarin varð fluttur á sjúkrahús til nærri kanningar.

Sambært løgregluni í Suðuroy, fekk maðurin, ið koyrdi bilin eitt anfall av onkrum slag, og tað var orsøkin til at hann misti tamarhaldið á bilinum.

# Buldrasligt vikuskifti

**11 fólk handtikin, seks frádømingar av koyrikortinum og nøkur innbrot er millum annað tað, sum løgreglan hevur tykist við um vikuskiftið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Tað hevur verið buldrasligt, ljóðaði svarið frá vakthavandi á løgreglustøðini í Havn í morgun, tá vit spurdu hann hvussu vikuskiftið hjá teimum hevði verið.

Ikki færri enn 11 fólk vóru handtikin fyri alt frá harðskapi, til herverk og húsaófrið.

Harðskapsmálini vóru tvey í tali. Tað fyrra var í Tórsgøtu í Havn leygarnáttina, har ein 15 ára gamal drongur fekk ein beint framman á frá einum 22 ára gomlum. Tann 15 ára gamli small niður í asfalti og fekk eisini nakað av skaða av fallinum. Løgreglan tók 22 ára gamla mannin og arbeiðir nú víðari við málinum. Seinna harðskapsmálið var somuleiðis í høvuðsstaðnum, tá ein 18 ára gamal var sligin niður uttan nakra orsøk. Eisini her var gerningsmaðurin 22 ára gamal, men tó ikki tann sami sum í fyrra førinum. Løgreglan fekk ikki fatur á manninum beinanvegin, men fangaði hann seinni úti í einum húsum í býnum. Hesin 22 ára gamli hevði framman undan ein treytaðan dóm fyri harðskap.

Vakthavandi á løgreglustøðini heldur, at talið av brotum á politiviðtøkurnar er vaksandi.

– Tað tykist ikki sum um, at fólk duga at uppføra seg. Tað plagar at vera friðarligt hesa ársins tíð, men soleiðis hevur tað ikki verið nú, sigur vakthavandi og leggur so aftrat, at møguliga er føstulávint orsøkin til hetta.

### 6 mistu kortið

Annars byrjaði vikuskiftið tíðliga hjá løgregluni og endaði seint. Longu fríggjanáttina vóru fleiri mál, tá miðnámsskúlaball var í høvuðsstaðnum. Tá tók løgreglan trý fólk fyri brot á politiviðtøkurnar, og um morgunin fekk løgreglan ikki færri enn seks mál aftrat at takast við. Hesi vóru øll um innbrot og stuldur í úthúsum og hjallum í býnum, har fólk høvdu verið og stolið kjøt, fisk, øl og tað sum sterkari er.

Sunnukvøldið var løgreglan eisini úti. Hesaferð á Kollafjarðarleiðini har teir gjørdu ferðmátingar. Løgreglan máldi ferðina hjá bilunum í óbygdum øki og tók fýra førarar, sum kunnu síggja fram til eina treytaða frádøming av koyrikortinum, tá teir vóru máldir at koyra millum 115 og 122 kilometur um tíman.

Aftrat hesum vóru tveir bilførarar tiknir fyri rúsdrekkakoyring um vikuskiftið, og missa teir nokk eisini koyrikortið.

Nakað soleiðis ber til at taka samanum úr 40 síðu longu vikuskiftisfrágreiðingini frá løgregluni, sum nú hevur fleiri mál at arbeiða víðari við.